miðvikan

Nr. 135 • 16. juli 2008

**Siðsøguligt tilfar**
í Sosialinum mikudagar

**Í grannalagnum hjá Tróndi í Gøtu:**

# Barnaár fyrst í farnu øld

**Tórir Thomsen heldur fram við síni frásøgn. Hann verður 90 ár tann 24. juli. Hann hevur tí upplivað at vera barn heilt tíðliga í farnu øld. Hann minnist eisini væl eina bygd, sum var so sera nógv øðrvísi enn í dag.**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo



*Tórir og pápabeiggin Símun Karl*

**3. partur**

**Á Mýruni**

Mamma mín æt Jovina, og hon var ættað av Mýruni í Syðrugøtu.

Yviri á Mýruni var eisini fitt av fólki. Omma æt Malena á Mýruni. Pápi hennara Jógvan var bóndasonur av Húsgarði. Hann var beiggi Rakul í Blásastovu, sum var langomma mín.

Mamma til ommu í Syðrugøtu, Marin Sofía, var slektað úr Frammistovu í Norðragøtu, dóttir Jákup í Frammistovu. Abbi í Syðrugøtu var slektaður av Skála. Hann æt Lutherus Christiansen og var sonur til Christian, bóndi á Krónni.

Hann var beiggi tann kenda útróðrarmannin Jóan Karl á Skála, sum nógvar søgur eru um. Har vóru eini 10 systkin. Seks av teimum fóru til Lorvíkar.

Sum sagt í undanfarnum parti handlaði Lutherus, abbi, í "pakkhúsinum", gamla handlinum í Norðragøtu undan Tummas Jakku. Men hann bleiv so sjúkur og doyði ungur, neyvan 40 ár. Omma og abbi áttu tríggjar



*Lutherus Christiansen, abbi Tórir í Syðrugøtu, var ættaður av Skála*

døtur. Umframt mammu vóru tað Kristina, sum var fotografur í Havn og Marin Sofía. Kristina og Marin Sofía tæntu niðri, men komu heim aftur.

Á Mýruni var eisini nokk so nógv fólk. Her vuksu upp systkini Jákup Andreas, Dánjal og Marsanna. Hon var kona Langa Petur Hans í Norðragøtu. Tey vuksu upp har, tí pápi teirra doyði. Ein beiggi teirra var Poul Kristoffur Poulsen, sum var tann fyrsti, sum hevði bil og eisini fyrsta motor í báti í Gøtu.

Á Mýruni búðu eisini Jógvan og Per, ommubeiggjar mínir. Ein beiggi var Líggjas, pápi Poul Huus, sum var skipari, millum annað á Wilhelminu.

Eg kom nógv til Syðrugøtar at vitja ættina hjá mær, so har var eg væl kendur.

Har handlaði Jóan Pauli Gregersen, og Benadikt Jacobsen handlaði hjá garðamonnum. Aðrir kendir handilsmenn í Syðrugøtu vóru Lorvíks Jóannes og Absalon á Dunga, seinni kendur sum Absalon á Skála. Jóan Elias tók seinni handilin eftir beiggjanum Jóan Paula.

## Skúlagongd

Eg gekk í skúla hjá Símun Paula í Konoy. Hann var ein góður lærari. Vit høvdu respekt fyri hinum. Hann dugdi eisini væl at fáast við børn. Tá eg fór í skúla var bert tann gamli skúlin frá 1890. Hann var so trongur, tí har var bert ein skúlastova. Fleiri flokkar vóru, og tí máttu vit eisini ganga í skúla um kvøldið. Tað var heldur ikki gingið í skúla hvønn dag.

Men í 1929 kom nýggi skúlin, sum var roknaður fyri at vera sera frammalaga, tann fremsti í Føroyum. Millum annað var fimleikahøll, sum tá var nakað sera forkunnugt. Eg kom tí eisini at ganga nøkur ár í hesum skúla. Upprunaliga var Símun Pauli úr Konoy einsamallur lærari. Hann hevði eisini vikarar, tí hann var løgtingsmaður og hevði onnur álitisstørv og var nokk so nógv burtur frá skúlanum. Konoy var ein úrmælingur á nógvum økjum. Hann var fyrsti formaður í Føroya Fiskimannafelag og gjørdi eitt stórt arbeiði fyri fiskimenn. Men eftir 15 ár legði hann frá sær, tí hann føldi, at hann bert fekk skomm og last frá parti av fiskimonnum fyri sítt arbeiði.

Samstundis sum hann var formaður í Fiskimannafelagnum, var hann eisini formaður í Lærarafelagnum. Hann hevur havt nógv um at vera. Umframt hetta var hann dugnaligur urtagarðsmaður og virkin í fráhaldsrørsluni. Hann var vinur við Peter Jensen, sum var umrøddur í røðini "Hendur ið Sleptu" fyri sítt slóðbrótandi virksemi innan losjuvirksemi. Peter Jensen var ofta í Gøtu og vitjaði "gamla lærara", sum hann varð kallaður. Konoy var eisini virkin innan háskúlan.

Ein vikarur hjá Gamla Lærara var Jákup Heinesen, sum gjørdist lærari í Kunoy. Eg hitti hann fyri nøkrum árum síðani, og hann mintist meg aftur. Ein annar vikarur var Wenningstedt, sum gjørdist ein kendur lærari í Havn, serliga kendur gjørdist hann innan handilsskúlan.

Í 1929 kom ein lærari afturat. Hetta var Jákup Simonsen, sonur Símun á Brúnni í Norðragøtu. Hann giftist við Ragnhild, dóttir Konoy. Í 1932 kom so Helga úr Kvívík. Hon giftist við Jákup Frederik Øregaard, kendur sum løgtingsmaður í 38 ár.

Nýggi skúlin hevði bert tvær skúlastovur. Tá ið "lærarinnan", sum hon var kallað, kom, gjørdist aftur brúk fyri gamla skúla frá 1890 við hansara einu skúlastovu. Her búðu Helga og Jákup Frederik eisini eitt skifti.

Tað vóru tískil tríggir lærarar í Gøtu skúla heilt fram til endan av 50-unum og kanska inn í 60-ini. Tá ið Konoy legði frá sær, kom Poul Enok Hansen úr Køkinum. Hann er á myndini av kirkjufólkinum í fyrsta parti av hesi røð.

Eg varð konfirmeraður í Lorvík í 1932. Eg búði hjá Jóan Paula við Stein. Kona hansara var abbasystir mín. Prestur var Hvass, sum var fyrsti prestur í Fuglafirði. Hann var væl dámdur og mundi vera har í eini seks ár.



*Frá vinstru Elsa, Elspa Katrina, mamma hennara, Rakul, systirin og Sanna Huus. Hon giftist við Poul Huus, sum va r systkinabarn Jovinu, mammu Tórir*